# Árinsmeting av royndarverkætlan KIOP009 á djór

SEV hevur heitt á Havstovuna um at dagføra árinsmetingina, sum vit í 2019 gjørdu av streymorku royndarverkætlanini: KIOP001. Hetta við støði í skjali: “KIOP009-MNT-100-REP-0002 Faroes 2.0 Project Description – Authorities”.

Við tí vitan, sum er tøk, meta vit yvirskipað ikki, at nýggja royndarætlanin við einum størri dreka á øðrum staði í Vestmannasundi víkur so nógv frá fyrru ætlanini, at orsøk er til at broyta upprunaligu árinsmeting okkara. Við teimum grundgevingum og fyrivarnum, sum vóru í upprunaligu metingini meta vit tí ikki, at stórvegis vandi er fyri ógvisligum árini á nakran djórabólk, og møgulig árin verða í øllum førum avmarkað til tíðarskeiðið, sum royndarverkætlanin koyrir.

Endurtakast má tó, at vitanarstøðið er avmarkað, og at neyðugt er við kanningum, sum kunnu geva betri grundarlag til at meta um møgulig árin frá tílíkari útgerð. Nýggja royndin við einum størri dreka er eisini meiri lík tí ætlaðu langtíðar verkætlanini í Hestfirði. Tí eiga árinskanningar at verða gjørdar beinleiðis í sambandi við henda størra drekan.

Við atliti til havsúgdjór, verður mælt til at ljóðmátingar verða gjørdar av orkuverkinum. Hesar ljóðmátingar kunnu skipast eftir sama leisti sum lýst í “KIOP001 PROJECT A summary of kite noise and impacts KIOP001-MNT-670-REP-0001”. Slíkar mátingar eiga at verða gjørdar av bæði minna og størra drekanum hvør sær, og tá tveir ella fleiri drekar virka samstundis. Mælt verður til, at eygleiðingar av hvali og kópi verða fyriskipaðar í nánd av orkuverkinum, meðan størri D12 drekin er í drift.

Av tí at neyðugu kanningarnar av sjófugli ikki vóru gjørdar í samband við árinsmetingina í 2019, er avgerandi, at hetta arbeiði verður gjørt nú, tá SEV vil royndarkoyra D12 drekan, ið er størri enn fyrri drekin og kemur at ávirka eitt væl størri øki.
Fyri at kunna siga nakað um nýtsluna hjá sjófugli av økinum, og møgulig árin, er neyðugt at eyðgleiðingar verða gjørdar 2 ferð um vikuna árið út. Hetta arbeiðið má byrja sum skjótast, og er eftir sama leisti, ið skotið var upp í samband við neyðugu árinsmetingarnar í Hestfirði.

11. februar 2022
vegna Havstovuna



Eilif Gaard, stjóri